Hoyringssvar til

Uppskot til Løgtingslóg
um málskúlafyri føroskt sum annaðmál

á Kambsdali 31. oktober 2023

Á Miðnámi á Kambsdali fegnast vit um, at ætlanin er at styrkja undirvísingina í føroyskum sum annaðmál við nýggjari lóggávu og fáa hana í eina trygga legu. Hetta er gott og neyðugt fyri at tryggja eitt dygdargott og javnbjóðis tilboð um alt landið.

Vit hava tó hesar viðmerkingar:
§1 Børn í fólkaskúlaaldri eiga at fáa hjálp í fólkaskúlanum – og fólkaskúlin eigur at fáa umstøður at taka sær av hesum – møguliga í samstarvi millum skúlar.
§3, stk. 2-3: Modellið á Kambsdali er púra ósjónligt í hesum orðingum og tykist vera sett heilt út av spælinum.
§3 stk. 6: Miðnám á Kambsdali ynskir at vera hoyringspartur, tá kunngerðirnar verða evnaðar til.
§4 Leisturin leggur upp til, at talan er fyrst og fremst um ein kommunalan málskúla, sum kann verða skipaður sum kommunalt samstarv. Tað er gott, at málskúlin er ankraður úti í kommununi, ið eigur at kunna hava tættasta sambandi við borgaran. Men sum er stendur Miðnám á Kambsdali fyri undirvísing í føroyskum sum annaðmál, tá talan er um drúgvu skeiðini eftir CEFR-skipanini – í samstarvi við kvøldskúlaleiðslurnar í Klaksvík og í størru kommunum í Eysturoynni. Vit meta orðingina "kommunalur málskúli... kommunalum samstarvi" at vera heldur leysa og næstan útihýsa tí leisti, sum nú á 2. ári er í gongd á Kambsdali og tykist rigga væl. Vit kundu hugsað okkum eina orðing, sum leggur upp til henda møguleika við at nevna, at útbúgvingin kann bjóðast út t.d. á einum miðnámsskúla ella skúlasamstarvi. Vit kunnu leggja afturat, at 5 lærarar av Kambsdali í løtuni eru undir útbúgving í føroyskum sum annaðmál. Vit mæla til skriva eitt nýtt stk. 2: "Kommuna ella kommunalt samstarv kann loysa uppgávuna saman við einum skúla ella skúlasamstarvi."
Serligu viðmerkingarnar til §4 nevna, at kommunurnar í trimum økjum hava skipað seg í samstarv, og at FSA útbúgving á Miðnámi á Kambsdali er eitt av hesum samstørvum. Lagt verður upp til, at hetta kann halda fram. Sagt verður, at kommunala málskúlaleiðslan (í einum samstarvi millum fleiri kommunur eru helst fleiri málskúlaleiðarar / kvøldskúlaleiðarar) kann vera kommunali kvøldskúlaleiðarin. Hetta meta vit ikki vera nøktandi. Øll fyrisiting av drúgvaru málskeiðunum, sum verða undirvíst á Kambsdali, liggur á Miðnámi á Kambsdali. Tað er tí ikki nøktandi, at tað er

kommunali kvøldskúlaleiðarin, sum stendur sum leiðari. Ein eind sum Miðnám á Kambsdali, ið umsitur málskúlan í samstarvi við kommunurnar, eigur sjálvsagt at hava egnan málskúlaleiðara, ið verður samsýntur fyri arbeiði sbr. §8 lutfalsliga eftir undirvísingartímatalinum. Um tað er hetta, meint verður við í serligu viðmerkingunum til §6, stk. 2, eigur tað at verða sagt beinleiðis. Sum er verður so stórur dentur lagdur á, at tað er ein 'kommunalur' kvøldskúlaleiðari, at ein freistast at halda, at tað er fyri at forða fyri, at skúlin, sum í verki umsitur økið, verður umboðaður. Hetta er ikki nøktandi. Sí eisini viðmerkingarnar til §6.

§4, stk. 2, pkt. 3: Broytingaruppskot: "Kommunan, kommunala samstarvið ella samstarvsskúlin skal seta hóskandi undirvísingarhølir og undirvísingaramboð til taks."

§5 stk. 2: Skuldi fakliga kravið kanska heldur verið "føroyskt sum annaðmál" – og ikki bara annaðmál.

§6: Um kommuna ella kommunalt samstarv leggur undirvísingina í føroyskum sum annaðmál til ein skúla, eigur hesin at kunna seta málskúlaleiðaran á staðnum. Sí viðmerkingar til §4.

§7 Málskúlastjórin setir lærarar í starv og loysir úr starvi, og alt landið er at rokna sum eitt setanarøki. Her høvdu vit ynskt, at eitt nú ein miðnámsskúli, kann nýta fólk, ið longu eru í starvi á skúlanum (sjálvsagt treytað av, at tey lúka førleikakrøvini, sbr. stk 2), og ikki, at hesi neyðturviliga starvsliga skulu flytast heilt ella partvís yvir í málskúlan fyri at kunna undirvísa. Tað er alneyðugt, at málskúlin kann seta lærarar í fast starv, men um starvssetan longu er tryggjað á øðrum skúla, skuldi tað verið nóg gott.

Broytingarupskot: Í §7 kundi verið skoytt uppí, at "Málskúlastjórin kann eisini gera avtalu við annan skúla um starvsfólk, ið eru í starvi har." Tað er neyvan gagnligt, at eitt starvsfólk í føstum starvi á skúlanum, skal niður í parttíð fyri at kunna taka parttíðar starv á málskúlanum. Tað er smidligari, at avtala verður gjørd millum stovnarnar um, at málskúlin "lænir" hesi starvsfólkini til FSA-undirvísingina. Avbjóðingar í kvøldskúlaskipanini summastaðni eiga ikki at vera stýrandi og órógvandi fyri tað, sum virkar í verandi skipan, har fólk í føstum starvi á einum skúla hava føroyskt sum annaðmál sum part av starvinum, hóast hesi liggja undir hvør síni skipan. Soleiðis kann longu savnaða vitanin og verandi samstarv í økinum halda fram. Tað er neyvan gagnligt, hvørki fyri lærarar ella næmingar, at nakrir fáir lærarar fara at arbeiða burturav við FSA. Tað kann bæði troytta næmingar og skapa starvsligt einsemi.

NB: §7 hevur tvey stk. 2

§8 Ivasamt er, um verandi praksis rúmast í lýsingini í §8. Vísandi til broytingaruppskot til §7 átti tað at verið møguligt, at starvsfólk fáa løn frá tí stovni, har tey eru sett, og at millumroknað verður millum stovnar fyri málskúlan. Hetta er galdandi fyri bæði lærarar og málskúlaleiðara.

§8, stk. 3 Endurgjald má, ið tann mun undirvísingin liggur á einum samstarvsskúla, fella beinleiðis til skúlan í lutfalli við undirvísingina.
§8, stk. 4: Sí viðmerking til §4, stk. 2, punkt 3:
§10: Ivasamt er, um kommunali málskúlaleiðarin (sum kanska er kvøldskúlaleiðarin) hevur so stóra vitan um økið. Vit halda, at skúli, ið hevur drúgvu undirvísingarskeiðini í føroyskum sum annaðmál, eigur at vera umboðaður í nevndini. Somuleiðis eiga eisini umboð fyri gransking og tey, ið gera undirvísingarmiðlar til økið, at vera við í nevndini. Stk. 2 má víðkast samsvarandi omanfyri standandi viðmerking.

Viðmerkingar til "almennu viðmerkingarnar" (s. 4ff):
Miðskeiðis á s. 5 verður samstarvið millum kvøldskúlaleiðslurnar í norðurøkinum við FSA-tilboðnum á Kambsdali umrøtt. Hetta samstarv er eftir okkara tykki ein góð loysn, og skúlin hevur gjørt munandi íløgu við at eftirútbúgva 5 lærarar innan FSA-økið við útbúgvingini, sum nú er í gongd á Setrinum. Men hesin 'skúla'parturin av skipanini er als ikki tikin við í lógaruppskotið. Vísandi til §7 kann ein eisini undrast á, at serútbúnir lærarar á skúlanum kanska ikki kunnu nýta sína útbúgving á skúlanum, men mugu skifta starv, fyri at kunna nýta útbúgvingina (sí viðmerking til §7 og broytingaruppskot).

Sum heild kennist tað eitt sindur órógvandi, at verandi leistur á Kambsdali (og møguliga aðrastaðni við) als ikki sæst í verandi lógaruppskoti, men í besta føri liggur fjaldur í orðingini "kommunalt samstarv".

"Serligar viðmerkingar" (s. 15ff) eiga at vera endurskoðaðar, so tær samsvara við broytta lógartekstin sambært omanfyri standandi viðmerkingum.

Vegna Miðnám á Kambsdali

Vinaliga

Óli Wolles, virkandi rektari
Miðnám á Kambsdali